

*Fleiri hava spurt: 'Hví tímir tú at ofra teg sjálvan fyri nakrar serbar og albanar?' Men sjálvandi tími eg tað. Í herinum geri eg mun og heimin til eitt betri stað at vera í. Tað er upp á tíðina, at ófriðurin í Kosovo steðgar.*
*- Allan*

*Eg eri als ikki bangin um at fara til Kosovo. Í roynd og veru gleði eg meg at royna lívið í herinum at mínum egna kroppi. Tað, at eg skal skriva testamenti, áðrenn eg fari avstað, taki eg ikki so hátíðarliga.*
*- Allan*

sjálvandi tími eg tað. Hóast eg bert eri ein ungur drongur, føli eg, at eg geri mun og heimin til eitt betri stað at vera í. Ófriðurin, sum hevur verið í so nógv ár í Kosovo, ávirkar eisini okkum, og tað er upp á tíðina, at tað verður friðartíð, heldur Allan.

– Tað er sjálvandi vandi á ferð, tá ein velur eitt sovorðið arbeiði, men dagliga hugsi eg als ikki um vandan ella deyðan, sigur Allan og leggur dent á, at tað skal altíð verða futtur í tí, hann ger:

– Eg hevði eitt nú ongantíð klárað at arbeitt í einum klædnahandli ella staðið á Stongum í Klaksvík og egnt allan dagin. Tað hevði verið alt ov einsháttað.

– Eg føli tað ikki sum eitt kall at fara til Kosovo. – Eg havi bara hug til at arbeiða í herinum.

## Vápnini well til eitt vist

Higartil hevur Allan bert roynt at nýta vápn í upplæringartíðini – millum annað í venjingarskógum og á skotskivum – men nú skal hann út í heim við bazooku í hondunum:

– Til nú hevur tað verið well at standa við einari bazooku í hondini. Men í Kosovo skal eg fyri fyrstu ferð royna at nýta vápn »í tí veruliga lívinum«. Eg veit ikki, hvussu well tað verður, um eg onkuntíð skal meiðsla ella drepa onkran. Men vit sleppa tó ikki at brúka vápnini, fyrr enn vit sjálvir eru í vanda, sigur Allan avgjørdur, tekur nakrar myndir upp úr taskuni og heldur fram at fortelja:

– Tá onkur doyr í danska herinum, fáa vit, sum eru í læru, tað altíð fyrst at vita. Og bara teir ellivu mánaðirnar, eg havi verið har, eru tríggir hermenn deyðir.

– Vit syrgja og práta øll um tað í fleiri dagar, og ein sálar-frøðingur er altíð til staðar í herinum. Men slíkar hendingar fær tó ongan at seta seg aftur. Ella í øllum førum ikki meg – tvørturímóti, sigur Allan greiður at enda.

## FAKTA

**Navn:** Allan G. Tungá
**Aldur:** 20 ár
**Starv:** Í danska herinum
**Bakgrund:** Uppvaksin í Klaksvík og á Sandoynni saman við trimum systkjum.
**Hjúnastøða:** Stakur

## Miðnámsskúlin ov keðiligur

Tað hevur ikki altíð verið ein dreymur hjá Allani at fara í herin. Hann hevur nevniliga somuleiðis ætlað at fingið sær eina útbúgving. Men tá hann hevði gingið á handilsskúla í eitt hálvt ár, varð tað ov einsháttað, og Allan vildi royna okkurt nýtt:

– Tá fekk eg hugskotið at melda meg í herin, sigur hann og leggur afturat, at allir danskarar verða kallaðir inn til hertænastu, men at hann noyddist at melda seg sjálvbodnan, tí hann er føroyingur:

– Eftir at eg hevði meldað meg í herin, skuldi eg fyrst og fremst fáa eina heilsuváttan frá læknanum og síðan til eina skrivliga roynd fyri at sleppa inn. Eg slapp tíbetur inn uttan hóvasták, greiðir Allan frá og skoytir uppí, at fyrst var hann millum annað í fýra mánaðir á Kongaskipinum og fekk eina grundútbúgving, har hann eitt nú lærdi at nýta vápn, gassmasku, at yvirliva í skóginum og at veita bráðfeingishjálp.

Eftir hetta skrivaði Allan sáttmála við herin, og tað er í hesum høpi, at Allan skal til Kosovo miðjan august.

**- horsdal**